SOSIALURIN 11. JUNI 2021

# VIKUskifti



# »Mr. James«

**– Eg visti sjálvandi væl, at tað, vit gjørdu, var vilt, sigur Jim Latrache-Qvortrup, sum undir navninum »Mr. James« lumpaði elituna í Norðurkorea**

# »Mr. James« lumpaði elituna í Norðurkorea

– EG VISTI SJÁLVANDI VÆL, AT TAÐ VIT GJØRDU VAR VILT, SIGUR DANIN **JIM LATRACHE-QVORTRUP**, SUM UNDIR NAVNINUM **»MR. JAMES«** FÓR UNDERCOVER Í HEIMSINS STRANGASTA OG MEST AFTURLATNA LANDI. NÚ HEVUR HANN VERIÐ Í FØROYUM VIÐ KONUNI Í NAKRAR DAGAR OG TIKIÐ SÆR AV LØTTUM

**Pætur Hjalmar Evensson**
pature@sosialurin.fo

Hann er fyrrverandi brotsmaður og soldátur. Hevur selt kokain til fína borgarskapin í Danmark og hevur sitið handan rimarnar í átta ár. Åhja.... og so hevur hann eisini risikerað sítt lív við at njósnast í Norðurkorea.

Maðurin eitur Jim Latrache-Qvortrup. Kanska betur kendur sum »Mr. James«, sum var dulnevni hansara, tá hann lumpaði norðurkoreansku elituna saman við donsku moldvørpuni Ulrich Larsen. Teir báðir hava undir leiðslu av journalistinum Mads Brügger avdúkað mutur og ólógligt virksemi hjá høgtstandandi persónum undir norðurkoreanska stýrinum. Jim Latrache-Qvortrup hevði týdningarmikla leiklutin sum karismatiski oljumilliarderurin Mr. James, sum var til reiðar at samstarva við norðurkoreanar um bæði vápn og rúsevni.

Og nú er hann so í Føroyum. Men hann er ikki her fyri at spionera, selja rúsevni ella vápn. Kriminellu fortíðina hevur hann nevniliga langt síðani lagt aftur um seg. Hann er komin til Føroya fyri at halda koparbrúdleyp saman við konu síni Nicoline Qvortrup.

> “Jim er ein, sum tekur stórar kjansir. Eitt ella annað stað er tað eisini tað, eg bleiv forelskað í”

Fína kopar-parið situr hendan hósmorgun (3. juni) og etur morgunmat í matstovuni á Hotel Føroyum, har tey – *sjálvandi* – búgva í suituni. Hon í flottum parisarahatti og hann í vanligari svartari t-shirt; kanska ikki akkurát soleiðis vit minnast stílin hjá tí altíð vælklædda Mr. James úr dokumentarfilminum "Muldvarpen – undercover i Nordkorea", sum sjokkeraði nógvar hyggjarar kring heimin í fjørheyst.

### Ein lítil uppgáva bleiv til meira

Tað var ongantíð ætlanin, at Jim skuldi allan vegin til Norðurkorea. Tí at byrja við skuldi hann bara ein túr til norska høvuðsstaðin Oslo. Men tað útviklaði seg til meira og meira, so hvørt sum Mr. James fekk størri týdning í





***Jim og Nicoline hátíðarhildu koparbrúdleyp í Føroyum, tey ótu millum annað á Koks***

*Myndir: Álvur Haraldsen*

## FAKTA

**Fyrrverandi jetsetpusharin Jim** Latrache-Qvortrup (48) gjørdist eitt kent andlit, tá DR vísti sendingina »Muldvarpen« hjá Mads Brügger. Hann eigur børnini Oscar og Neo, og kona hansara er Nicoline Qvortrup (36). Saman eiga hjúnini Kaatsu Massage & Fysioterapi.

# »Mr. James« lumpaði elituna í Norðurkorea

*... framhald*



Her situr Mr. James og prátar við Alejandro – og alt verður filmað við fjaldum kamera

arbeiðnum at fáa upplýsingar frá Alejandro Cao de Benós, formanninum í altjóða koreanska vinarfelagnum KFA. Tað var ikki tað, sum journalisturin Mads Brügger hevði roknað við, tá hann fyrstu ferð heitti á Jim um at arbeiða undercover fyri seg í 2015, tá teir hittust til eina miðlaveitslu. Men tað passaði honum væl, tí tað vísti seg, at Jim var tað upplagda valið til uppgávuna.

Aftaná at nakrar fundir við Alejandro Cao de Benós í Oslo og Madrid verða teir bjóðaðir til høvuðsstaðin Pyongyang í Norðurkorea.

– Fyrstu ferð var tað hann, sum fortaldi, hvat teir kundu. Aðru ferð var tað meira eg, sum segði, hvørjum vit vóru áhugaðir í. Altso vápnum og metamfetamin, fortelur Jim.

– So segði hann, at vit skuldu til Norðurkorea. So koma vit har, og tað endar so við, at eg blívi vápna-agentur fyri teir. Tað er kompliserað at heinta vápn í Norðurkorea orsakað av nógva eftirlitinum. Tí blivu vit samdir um, at tað hevði verið smartast, um vit bygdu eina vápnafabrikk uttan fyri landið, greiðir Jim íðinn frá.

Og til eina veitslu í einum mystiskum kjallara endar Mr. James við at skriva undir eina samstarvsavtalu við norðurkoreansku fyritøkuna Korea Narae Trading Corporation um at gera eina fabrikk í einum triðja landi, sum skal framleiða hernaðarliga útgerð og rúsevni sum metamfetamin og retalin.

Teir tosaðu um at gera tað í Russlandi, men Mr. James helt ikki, at tað var eitt so gott hugskot. Tað endaði so við at blíva til Uganda.

– Mín uppgáva var millum annað at finna stað, bátar, hotell og tyrlur, flennir Jim.

## Angrar tað ikki

*Vart tú ikki bangin?*

– Altso eg helt bara, at tað var stuttligt, sigur Jim við einum skálasmíli, meðan hann flennandi lenar seg aftur á stólinum.

– Tú bleivst til Mr. James, sigur Nicoline.

– Ja. Tað var jú ein process, sigur hann.

– Men altso, eg visti sjálvandi væl, at tað vit gjørdu, var vilt. Tað visti eg, slær hann fast.

Tí vilt var tað í den grad. Tað er longu óvanliga trupult at sleppa inn í Norðurkorea, og tað skal nógv til fyri at fáa




Permumyndin til dokumentarfilmin "Muldvarpen", sum kom í trimum pørtum og sjokkeraði nógv við sínum avdúkinum. Ulrich Larsen er maðurin á permuni

norðurkoreanarar at stóla upp á seg. Men tað eydnaðist onkursvegna hjá ósmædnu dønunum, og so kann mann bara ímynda sær, hvussu norðurkoreanararnir reageraðu, tá teir hoyrdu, at teir vóru lumpaðir til at fortala og avdúka seg sjálvar. Atlit var av somu orsøk tikið til trygdina hjá Jim og Ulrich tíðina aftaná, tí mann stúrdi fyri náðileysum avleiðingum.

*Tú angrar ikki, at tú vart við?*

– Nei, nei, nei. Yvirhøvur ikki, sigur Jim.

## – Tað var lætt og natúrligt fyri meg

Tað er ikki av tilvild, at tað bleiv akkurát Jim, sum fekk uppgávuna at vera Mr. James. Tí tað er ikki ein og hvør, sum kann átaka sær hendan serliga, týdningarmikla og vandamikla leiklutin. Við sínum nógvu royndum við kriminaliteti og rúsevnissølu var Jim sum skraddaraseymaður til uppgávuna, metti journalisturin Mads Brügger, sum longu hevði arbeitt uppá hendan dokumentarin saman við fyrrtíðarpensioneraða kokkinum og familjupápanum Ulrich Larsen í nøkur ár.

Jim loysti uppgávuna sum Mr. James til UG, og hyggur mann at filminum, sær tað út sum, at hann ikki hevur gjørt annað, so ektaður hann virkar í samráðingum við norðurkoreanarar um vápn og rúsevni.

*Var tað lætt?*

– Tað er ringt at siga. Tí fyri meg var tað lætt. Men eg haldi bara, at tað hevur nakað at gera við tað lívið, sum eg havi livað. Tað hevur verið natúrligt fyri meg, sigur Jim, sum eitt nú hevur búð á barnaheimi, kostskúla, verið

> “So segði hann, at vit skuldu til Norðurkorea. So koma vit har, og tað endar so við, at eg blívi vápna-agentur fyri teir”

*Jim er í holt við at skriva eina bók um sítt lív*



fallskíggjasoldátur í Fremmedlegionen og sitið í geglinum í fleiri ár.

Kona hansara Nicoline heldur, at hesar nógvu royndirnar frá gamla lívinum og umhvørvinum hava havt sína ávirkan á, at tað fall honum so lætt at mingelera við norðurkoreanarar uttan trupulleikar.

– Jim hevur altíð lagað seg til umstøðurnar, har hann hevur verið. Av tí sama er hann eisini blivin øgiliga dugnaligur til at skapa sambond við alt slag av fólki. Hann hittir fólk, har tey eru. Hann kann líka so væl blíva vinur við narkomanin í Istedgade, sum hann kann blíva vinur við stjóran í einari stórari altjóða fyritøku. Hann hevur evnini til at fáa fólk at stóla upp á seg. Tí eydnaðist tað honum so væl í Norðurkorea, sigur ein errin Nicoline.

Sjálvur hevur Jim eisini eitt annað boð upp á, hví norðurkoreanararnir ikki kláraðu at gjøgnumskoða og avdúka seg.

– Um fólk ordiliga gjarna vilja hava okkurt, so verður kritiski sansurin ávirkaður. Haraftrat hevur tað sjálvandi eisini gjørt stóran mun, at tey sóu Ulrich sum ein av teimum, sigur hann og sipar til, at Ulrich gjøgnum fleiri ár var partur av einum norðurkoreanskum felagsskapi sum liður í arbeiðnum at avdúka teirra metodur.

## Gav honum ein kjans

Jim byrjaði longu at selja rúsevni sum 23 ára gamal. Hann var ikki pushara-typan, sum var at finna í teimum trongu og myrku gøtunum – nei, hann livdi luksuslívi í jakkasetti, og kundar hansara vóru politikarar, stjórar, tónleikarar, journalistar og sakførarar. Jim var sokallaður *jetsetpushari*.

15. mars 2006 bleiv hann so handtikin fyri fyrstu ferð. Hann bleiv dømdur 5,5 ára fongsul, men sat bara í tvey ár og átta mánaðir. Um hetta mundið møtti hann sínum





kærleika Nicoline, og tá hann so varð latin leysur aftur, fóru tey allan vegin til India at gifta seg.

Men bara átta mánaðir seinni, bleiv hann aftur handtikin. Aftur fyri sølu av kokain. Nicoline visti av ongum og bleiv tí púra ovfarin, tá Jim fekk ein fongsulsdóm á heili átta ár. Nú vóru góð ráð dýr hjá nýgiftu hjúnunum. Hóast alt talaði fyri, at hetta var tað, so valdi unga Nicoline tó at geva tí tá enn nýggja manninum ein eyka kjans – men tað var treytað av, at hann gavst við øllum tí kriminella og fór at taka eina útbúgving. Tað lovaði Jim. Tók HF-prógvið í geglinum og fekk eitt miðaltal á 11,7, sum var nokk til at sleppa inn at lesa sálarfrøði á KU, tá hann slapp út fimm ár og fýra mánaðir seinni.

## – Eg visti væl tað var vandamikið

Fyri Nicoline var tað við blandaðum kenslum, tá Muldvarpen-ævintýrið byrjaði at taka dik á seg í 2016.

– At byrja við helt eg, tað var púra beint, tí tá skuldi hann bara til Noregs. Síðani skuldi hann eisini til Spania. Men tá hann segði, at hann skuldi til Norðurkorea, bleiv eg nokkso nervøs, tí tað ljóðaði nokkso vandmikið, fortelur Nicoline.

– Men eg sá, hvussu nógv hann brendi fyri hesum projektinum, so eg vildi ikki spenna bein fyri honum, sigur hon.

Tað var avmarkað, hvussu nógv hon visti um, hvat Jim gjørdi í Norðurkorea, tí tey tóku ongan kjans at siga nakað avdúkandi í telefonsamrøðunum, um nú onkur avlurtaði tey.

– Eg visti væl, tað var vandamikið, men eg visti eisini, at Jim er soleiðis, sum hann er. Hann er ein, sum tekur stórar kjansir. Eitt ella annað stað er tað eisini tað, eg bleiv forelskað í. So eg bað hann lova mær at ansa upp á seg sjálvan í Norðurkorea, sigur Nicoline, sum ógvaðist við, tá hon sá liðugtklipta filmin í klippirúminum, tí tá gekk tað veruliga upp fyri henni, hvussu vandamikil ferðin var.

## Tíðin aftaná Muldvarpen

Síðan Jim var við í Muldvarpen er hann blivin eitt kent andlit í Danmark, og hann verður dagliga steðgaður av fólki á gøtunum. Tað hevur latið nógvar hurðar upp, fortelur hann. Klædnafyritøkur hava til dømis spurt, um hann vil vera frontfigurur fyri tey. Eisini hava fleiri framleiðslufeløg vent sær til hann fyri at hoyra, um hann vil vera við í ymsum sjónvarpsframleiðslum. Summar reality-sendingar hevur hann takka nei til, men hann er við í onkrum øðrum spennandi, men hvat hetta er, er enn loyniligt.

– Tað er nokkso vilt, sum vit hava upplivað við Muldvarpen. Tí haldi eg eisini, eg skal vera nokkso varin við, hvat eg fari við til aftaná. Í løtuni hevur mann eitt nokkso gott momentum, har fólk halda tað vera pissikul, sum mann hevur gjørt. Um eg skal vera við í onkrum, skal tað helst vera okkurt upplýsandi, sum gevur meining og kann gera heimin til eitt betri stað, sigur Jim, sum hinvegin heldur, at Muldvarpen gav meining.

– Men ein sending verður víst á DR skjótt. Tað minnir eitt sindur um Muldvarpen.

*Áhja, ert tú eisini spión har?* spyrji eg, og Nicoline svarar:

– Tað er hann ikki, men lat meg siga tað upp á hendan mátan: tað er í hvussu er ikki ófarligt upp á nakran máta, sigur hon.

Meðan vit práta aftur og fram við morgunmatarborðið, ringir telefonin hjá Jim.

– »Kaatsu massage, det er Jim?« sigur Jim.

Hann og konan hava nevniliga eina massagu-fyritøku í Keypmannahavn, har tey hava fýra massagu-klinikkir ymsastaðni í býnum. Nú er tað helst onkur kundi, sum ringir fyri at spyrja um eitthvørt.

## Av tilvild tey komu til Føroya

Jim og Nicoline hava úr at gera við massagu-virkseminum, og tí var tað kærkomið at sleppa sær ein túr til Føroya í nakrar dagar. Og tað var nokkso nógv av tilvild, at tey funnu upp á at koma hendan vegin. Tí fyri trimum vikum síðani møttu tey Johannes Jensen á matstovuni Nimb, har tey millum annað prátaðu um Koks.

– Tríggjar tímar seinni sendi Jim eini boð til Johannes og fortaldi, at nú hava vit keypt okkum flogferðaseðlar til Føroya. Tað kom nokkso óvart á Johannes, haldi eg. Men soleiðis er tað ofta hjá okkum. Ikki so langt frá tanka til handling, flennir Nicoline.

Tí endaðu tey á Koks á brúdleypsdegnum.

– Hatta var eitt av tí besta, eg havi upplivað. So autentiskt at sita úti í náttúruni og eta forkunnugan mat, sigur Jim.

– Ja, tað var nakað so fantastiskt, sigur Nicoline.

Umframt Koks hava tey eisini verið á eitt nú Áarstovu og the Tarv. Í Gásadali og í fjøllunum, siglt í Hesti og etið føroyskan mat.

– Tað hevur virkuliga verið stuttligt og áhugavert at verið her. Vit vistu ikki, hvussu tað var í Føroyum áðrenn, tí vit hava ongantíð verið her. Vit koma uttan iva aftur, siga tey.